# Eitt óvanligt kvøld við Hensley



**Føroyingar fáa eitt óhoyrt høvi til at hoyra Ken Hensley greiða frá sínum tónleiki, tá ið hann hevur workshop í Atlantis fríggjakvøldið 13. august**

Mitt í august mánaði kemur bretski tónleikarin Ken Hensley til Føroya at vitja. Hann skal spæla á stóra Summar Festivalinum, sum verður hildin í Klaksvík í døgunum frá 12. til 15. august.

Ken Hensley var í nógv ár drívmegin í bólkinum Uriah Heep, og hann skrivaði nógv av stóru hittunum hjá bólkinum. Seinnu mongu árini hevur Ken Hensley havt solokarrieru sum tónleikari, og hann er nógv virdur fyri sínar sangir og sítt orgulspæl.

Umframt at hoyra Ken Hensley við sínum egna bólki fyri fullum útblástri á stóru útikonsertini á Vágsbøi leygardagin 14. august, verður eisini ein annar møguleiki at hoyra Hensley.

### Greiðir frá sínum tónleiki

Fríggjakvøldið 13. august kl. 21.00 fáa føroyingar nevniliga eitt einastandandi høvi at hitta kenda tónleikaran, tá ið Ken Hensley fer at greiða frá sínum tónleiki á einari workshop í mentanarhúsinum Atlantis í Klaksvík.

Hann fer at geva áhoyrarunum eitt innlit í sínar sangir og sín tónleik, hann fer at spæla onkrar av teimum og annars greiða frá, hvussu hann skrivaði teir. Hann fer eisini at siga onkrar søgur frá sínum langa og spennandi tónleikalívi, og áhoyrararnir fáa eisini møguleikan at seta honum spurningar.

Hetta verður eitt fantastiskt høvi at hitta Ken Hensley til eitt hugnaligt og áhugavert tiltak. Avmarkað atgongd verður til tiltakið, og atgongumerkini verða sett til sølu í næstum.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av suðri og útsynningi og fyrrapartin yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin ælingur. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av suðri og landsynninig og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 13 og 16 stig.




**Veðrið mánadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynninig og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 15 og 18 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Gul. til stívt andøvsgul av landsynningi og týsdagin yvirhøvur turt, men mikudagin ælingur. Hitin millum 14 og 18 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | 7 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 14 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 14 |
| Aberdeen | 17 |
| London | 28 |
| Tromsø | 16 |
| Bergen | 17 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 25 |
| Keypmannah. | 22 |
| Helsinki | -- |
| Moskva | 23 |
| Berlin | 22 |
| Warzawa | 22 |
| Kiev | 22 |
| Bukarest | 20 |
| Paris | 27 |
| Madrid | 29 |
| Róm | 26 |
| Malorca | 30 |
| Athen | 30 |
| Malta | 27 |
| Tunis | 31 |
| Beijing | -- |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | -- |
| Jakarta | -- |
| Sydney | 15 |
| New York | 27 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 22 |
| Panama | -- |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 15 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 979 hPa. í útsynning úr Íslandi stendur mestsum í stað og grynnist. Kuldabrúgvin haðani til havið eystan fyri Føroyar fer í landnyrðing.




**Í dag:**
Hátrýstið yvir Bretsku Oyggjunum fer spakuliga norðureftir og mennist. nakað. Eitt lágtrýst, 1006 hPa. yvir Atlantshavinum á 55N-30V fer norðureftir og dýpist.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 29/07 kl. 06[00]–30/07 kl. 06 [00]. Hitin í gjár: 12,1°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,4 mm – mált frá 29/07 kl. 06 [00]–30/07 kl. 06 [00]
Avfallið higartil í juli: 63,4 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

30. juli: Mánin næstur jørðini
31. juli: Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 31. juli | 06.58 | 19.26 | 05.58 | 18.26 | 06.13 | 18.41 | 08.58 | 21.26 | 09.58 | 22.26 | 05.13 | 17.41 | 04.13 | 16.41 | 07.13 | 19.41 | 08.13 | 20.41 | 06.43 | 19.11 | 07.58 | 20.26 |

5 707265 100067 >